# Rúni og Tromsø vunnu fyrsta finaludystin



*Føroyski landsliðsleikarin, Rúni Weihe, og liðfelagar hansara úr Tromsø, vunnu um vikuskiftið fyrru finaluna um norska meistaraheitið 3-1 á Nyborg.*

*savnsmynd*

**Føroyski flogbóltsútisetin í Noreg, Rúni Weihe, vann saman við liðfeløgunum sínum í BK Tromsø fyrra finaludystin um norska meistaraheitið leygardagin.**

FLOGBÓLTSÚTISETI

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ikki kann sigast annað, enn at tað hevur gingið væl hjá Rúna Weihe í norskum flogbólti. Síðani Rúni flutti til Tromsø í norður-Noregi, hevur hann spælt við lokala felagnum BK Tromsø, og í fjør gjørdu teir ikki mætari enn at vinna norsku greipuna. Nú nærkast endin á hesum kappingarárinum, og Tromsø er í finaluni um meistaraheitið.

### Kunnu tryggja meistaraheitið leygardagin

BK Tromsø fekk akkurát bjargað sær sess í finaluni, har mótstøðuliðið er Nyborg, sum vann grunnspælið.

Leygardagin var so fyrsta finalan á skránni, og hon var leikt á heimavøllinum hjá Rúna og liðfeløgunum í Tromsøhallen. Tromsø fekk eina heldur trilvandi byrjan upp á dystin, og teir taptu eisini fyrsta settið 20-25.

Men so kom heimaliðið fyri seg, og í veruleikanum var eingin ivi um, hvagar sigurin fór, tá ið Tromsø kom í gongd. Teir vunnu trý tey næstu settini trygt 25-18, 25-17 og 25-19. Harvið hevur Tromsø tikið eitt stórt stig móti at endurvinna norska meistaraheitið, og komandi leygardagin kunnu teir tryggja sær meistaraheitið, tá ið tær skulu spæla móti Nyborg á útivølli í Bergen, har liðið er heimahoyrandi.

# Coventry mátti lúta

Hóast teir nú hava lyft seg upp um niðurflytingarstrikuna, so mátti Coventry taka til takkar við einum greiðum tapi, tá teir um vikuskiftið vitjaðu hjá West Ham.

Úrslitið av dystinum gjørdist 3-0 til vertirnar, sum eru beint undir plássunum, sum geva møguleika at spæla um pláss í Premier League.

Tað gekk tó long tíð, áðrenn West Ham vissaði sær stigini. Fyrstu fimm korterini megnaðu Coventry at standa ímóti trýstinum, men tá Richard Shaw var óheppin at gera sjálvmál, fall alt saman. Bobby Zamora og gamli kenningurin, Teddy Sheringham skoraðu tey bæði seinastu málini.

Coventry vann fyrr í seinastu viku 2-0 á Nottingham Forest, og tí eru teir nú fimm pláss oman fyri niðurflytingarstrikuna. Tryggir eru teir tó langt ífrá, tí tað eru bara tvey stig millum Coventry og hóttandi strikuna.

Claus Bech Jørgensen var ikki í hópinum hjá Coventry hesaferð.

*-jm*

# Føroyskt fimleikabragd í Danmark

**Enn einaferð hevur eitt føroyskt fimleikalið gjørt vart við seg í kapping í Danmark. Leygardagin luttóku smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag í DM fyri lið, og føroysku genturnar gjørdust greiðir vinnarar**



*Katrin Abrahamsen og Elið Heðinsdóttir Joensen handaðu vegna fimleikasambandið smágentunum gullmerkir. Av tí at genturnar bert vóru gestaluttakarar í DM, fingu tær onki gullmerkir í Danmark.*

*Mynd: Pætur Niclasen*

FIMLEIKABRAGD

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið vóru smágenturnar hjá Havnar Fimleikafelag í Danmark, har tær tóku lut í kappingini um Danmarksmeistaraheitið. Kappingini fór fram í Odense, og kappast var í tveimum íðkanum.

### Nógv fremstar

Smágentuliðið hjá Havnar Fimleikafelag gjørdust fyrr í ár føroyameistarar, og leygardagin var so kappast móti bestu donsku liðunum.

Donsku liðini høvdu frammanundan kappast um at vinna sær sess í finaluumfarinum, og sjey lið høvdu vunnið sær rætt til at dystast um meistaraheitið saman við føroysku gentunum.

Sum áðurnevnt var kappast í tveimum íðkanum. Ein íðkan var frí, meðan hin var við einum hondamboði. Øll tey donsku liðini høvdu valt at nýta vimplar í amboðsíðkanini, meðan tað føroyska liðið royndi seg við gjarum.

Ferðaleiðarin hjá liðnum hjá Havnar Fimleikafelag í Danmark, Guðrun Guðjónsson, sigur, at tað gekk stak væl hjá gentunum á gólvinum, men hon heldur tó ikki, at tað gekk óvanliga væl.

Føroyska liðið var síðsta liðið, ið royndi seg, og tá ið tær fingu metingina frá dómarunum stutt eftir, var greitt, at tær høvdu vunnið kappingina bæði væl og virðiliga. Liðið hjá Havnar Fimleikafelag fekk 34,45 stig, meðan besta danska liðið fekk 32,35 stig. Í fimleikahøpi er hetta ein rættuliga greiður munur.

### Høgri støði í Føroyum enn í Danmark

Guðrun Guðjónsson sigur, at í Danmark undrast tey á, hvussu tað ber til, at støðið innan rútmiska fimleikin í Føroyum er so høgt. Tað er einki at taka seg aftur í, at støðið í Føroyum er væl hægri enn í Danmark, sigur Guðrun.

Sjálv heldur Guðrun, at ein av orsøkunum til høga støðið í Føroyum er tann, at kappingin her heima er ógvuliga hørð. Tær føroysku genturnar venja vanligani tvær ferðir hálvannan tíma um vikuna, og er hetta áleið tað sama, sum donsku liðini gera.

Tá ið smágentuliðið hjá Havnar Fimleikafelag kom heim aftur til Føroya sunnukvøldið, var skipað fyri móttøku fyri teimum við hornblástri og øðrum góðum.

Heilt fitt av fólki var komið saman á farstøðini at taka ímóti og heiðra gentunum. Umboð fyri Fimleikasamband Føroya handaðu gentunum medaljur, tí av tí at tær vóru gestaluttakarar í kappingini í Danmark, fingu tær ikki medaljur í Odense. Eisini helt Heðin Mortensen, borgarstjóri og ÍSF-forseti, røðu, og tað sama gjørdi Anni Kyster Durhuus, formaður í Havnar Fimleikafelag.

# Jón Rói brúkti aftur høvdið

**Horsens og SønderjyskE tykjast hava beina kós ímóti bestu deildini, meðan tað gongur striltið hjá Fremad Amager, sum ikki hevði Andrew av Fløtum millum teir fyrstu ellivu**

DANMARK 1./2. DEILD

*Jóannes Hansen*

Jón Rói Jacobsen er væl umtóktur í Frem, har hann eigur rimmar fast pláss í miðverjuni. Umframt at hann verður mettur sum sera hollur verjuspælari, so hava teir í Valby eisini fingið eyguni upp fyri, at føroyski spælarin hevur góðar álopsdygdir.

Hesa ferð var Frem í Næstved, sum ikki hoyrir heima millum tey stinnu í deildini. Hjá Frem hevur tað ikki gingið meiri enn passaligt í vár, men hesa ferð var eingin slingur í valsinum. Frem vann 3-0, eftir at støðan í steðginum hevði verið 2-0. Jón Rói Jacobsen skoraði til 3-0, tá ið seinna umfarið var fimm minuttir gamalt. Hann var hægstur og setti krúllin undir hornasparks innlegg.

Í Sundby gekk ikki væl hjá Fremad Amager og Andrew av Fløtum. SønderjyskE, sum er á øðrum uppflytara plássinum, vitjaði, og teir fóru aftur til Haderslev við øllum stigunum. Úrslitið var 1-3, og hetta var triðja tapið hjá Fremad Amager í ár. Andrew av Fløtum var ikki millum teir fyrstu ellivu. Hann slapp ikki framat, fyrrenn tað restaðu trettan minuttir, og støðan var 3-1 til gestirnar.

Hjá Horsens gongur tað sum eftir ánni í landskappingini. Stóri lúsingurin í steypakappingini, har Horsens mikukvøldið í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini á heimavølli tapti 4-0 ímóti FCM, tóktist ikki vera við í ferðalagnum, tá ið Horsens sunnudagin var í Gladsaxe og vitjaði AB. Horsens skoraði einasta málið í 1. hálvleiki, og harvið varðveittu Johan B. Hansen og liðfelagarnir fremsta plássið.

Gamli NSÍ spælarin, Ulrik Balling, skoraði til 2-0, tá ið Vejle hevði vitjan av Fredericia. Tað var longu í fimta minutti. Vejle vann 4-3.

### Einki serligt

Í 2. deild hilnaðist tað einki serligt hjá teimum báðu føroysku feløgunum. Holsterbro, sum hevur John Petersen á liðnum, spældi á heimavølli ímóti Hjørring. Úrslitið var 3-3, men John Petersen taldist ikki millum málskjúttarnar hjá Holsterbro. Sambært heimasíðuni hjá felagnum legði John upp til eitt mál, og hann hevði ein so góðan møguleika, at heimasíðan heldur, at hann átti havt skorað.

Holsterbro var frammanfyri 3-1, áðrenn gestirnir svaraðu tvær ferðir aftur. Holsterbro misti ein mann, so misti Hjørring ein mann, og í næstsíðsta minuttinum var enn ein Holsterbro spælari rikin av vøllinum.

Lyngby, sum næstsíðsta sunnudag vann stórsigur, var hesa ferð í Holbæk. Heimaliðið vann 1-0, og harvið mistu Christian Lamhauge Holst og liðfelagarnir eitt sindur í toppstríðnum.